Kunningarskriv 2008

Sørvágs Kommuna

sorvag.fo

Góðu borgarar í Sørvágs kommunu!

-Tíðin rennur sum streymur í á. - Soleiðis yrkir eitt av okkara kendu skøldum. Og tað mugu vit eisini sanna, nú 4 ár eru liðin, síðani sitandi bygdarráð tók við. Mangt hevur verið at trivið í, okkurt at halda fram við, okkurt at byrja, okkurt at gera liðugt – og okkurt at lata víðari til komandi bygdarráð.

Øldirnar fara
øldir munnu koma
ætt eftir ætt søkkur undir mold...

Soleiðis tekur Jákup Dahl til í einum av kendastu jólasálmum okkara. Eisini hann var greiður um, hvussu stutt tey ymisku skeiðini eru í einari – at síggja til – endaleysari rød.

Soleiðis hevur altíð verið – eisini í kommunalum arbeiði. Vit taka við har onnur sleptu. Standa á herðunum á øðrum. – Og soleiðis eigur tað at vera. -

Vit eru komin til enn eitt vegamót í kommunala arbeiðinum, har nýtt bygdarráð er valt. Tað setir fyrsta spónin í greytin tann 1 januar.

Eg fari í hesum kunningarriti í stuttum at greiða frá virkseminum hjá bygdarráðnum í farna ári.

Teknisk mál

Av tí at sera nógv vega- og anleggsarbeiði hevur verið í kommununi seinastu árini, hevur tað órógvað umstøðurnar hjá borgarunum í ferðsluni meira enn gott er. Væntandi verður hetta virksemið ikki eins nógv í komandi ári.

Arbeiðið at útvega byggibúgvin grundøkir í kommununi er nú komið so langt áleiðis, at vit eftir øllum at døma klára at nøkta hendan tørvin eina tíð framyvir.

Arbeiðið at fríðka um í bygdunum heldur fram. Peningur er settur av á komandi fíggjarætlan til hetta.

Øllum kunnugt hevur Dia Jacobsen – "Leyningurin" nevndur – nú í eina tíð verið í holt við eitt eyðsýnt væla arbeiði á Niðara vegi. Ætlanin er, at henda sera snotiliga grótlaðingin – ið lættliga kann vísa seg at gerast eyðmerkingin av bygd okkara, skal halda fram í komandi ári.

Vinnuøkið við flogvøllin er nú komið so langt áleiðis, at teir fyrstu tveir vinnubygningarnir eru gjørdir. Nú økið er um at verða liðugt, kann tað bjóðast út, soleiðis at fólk á staðnum - ella aðrastaðni frá - kunnu stovna virksemi í kommunu okkara.

Skúlin

Økið við Gamlaskúla er nú um at verða liðugt byggibúgvið til nýggja tónleikaskúlan. Væntandi byrjar Berg Rasmussen, byggimeistari, at smíðja við ársbyrjan 2009.

Fyrireikingararbeiðið til at gera triðja og seinasta byggistið við Sørvágs skúla er nú komið so langt áleiðis, at skitsuprojektið er liðugt. Tað eru Fuglø arkitektar úr Klaksvík, sum hava staðið fyri hesum.

Væntandi fer komandi bygdarráð at taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram við hesari verkætlanini.

Havnarøkið
Virksemi á havnarøkinum er vaksandi og Sørvingar vóru glaðir og stoltir, tá tveir bátar stevndu inn eftir vágni í mai mánaða í ár. Hesir vóru Kallsevni og Grímur Kamban, ið nú verða drivnir úr Sørvági. Tað er Tummas Henriksen, ið - saman við øðrum - hevur fingið bátarnar til Sørvágs. Og beint sum hetta skrivið var evnað til, kom stóri trolarin Brestir grøvandi inn eftir fjørðinum og legðist við bryggju her hjá okkum. Hugaligt!

Hóast døpru útlitini í fiskivinnuni – og í vinnuni sum heild – eiga vit tíbetur enn aktørar, ið hava dirvi og hug til at royna at fáa nakað burturúr, til gagns fyri okkum øll.
Árið hjá Landingarmiðstøðini sær munandi betri út í 2008 enn í 2007.
Væntað verður, at Landingarmiðstøðin kemur at taka ímóti uml. 5.000 tonsum í ár, ímóti 3.800 tonsum í fjør.

Enn eitt nýtt virki lat upp á havnarøkinum í 2008. Tað var í september at fyrstu laksarnir fóru ígjøgnum maskinurnar hjá nýggja kryvjivirkinum LUNA. Hetta virkið er sera framkomið og verður allur laksurin hjá LUNA arbeiddur á virkinum - tvs. úr Gøtu, Miðvági og Sørvági.

Í 2008 verða væntandi kruvd 4.300 tons av laksi. Væntað verður, at talið verður tað sama í 2009.

Luna byrjar at taka laks her á fjørðinum komandi ár, væntandi verður byrjað í juli.
Teir hava 900 tús. laksar gangandi á Sørvágsfirði og um alt gongur eftir ætlan, skuldi hetta, tá slaktað verður, givið uml. 4.000 tons.

Tað starvast 22 fólk á virkinum og á fjørðinum eru 3 fólk.

Vága floghavn

Nú sær tað út til at útbyggingin av Vága floghavn byrjar í komandi ári. Virksemið av hesum fer uttan iva at hava stóra ávirkan á virksemið í kommunu okkara næstu árini. Vón okkara er, at hetta økta virksemið kann viga uppímóti tí afturgongd, ið væntandi verður í búskapi okkara komandi árini.



Uppskot okkara um eina hjábreyt til verandi flogvøll, ið ætlandi skal liggja í Klovanum, er framvegis til viðgerðar hjá myndugleikunum og Vága floghavn. Vónandi verður uppskotið veruleiki. Ein hjábreyt í Klovanum hevur sjálvsagt fleiri fyrimunir fyri kommunu okkara.

Heimasíðan

Kunning á heimasíðum vinnur meira og meira á øðrum kunningarmiðlum. Hetta hevur við sær størri krøv til okkara kommunalu kunning til borgararnar í kommununi. Sum kunnugt, ber til at fara inn á heimasíðu okkara. www.sorvag.fo

Tað hevur verið nakað skiftandi, hvussu virkin okkara heimasíða hevur verið. Tað er týðuligt – og sjálvsagt – at vitjanirnar økjast munandi, tá heimasíðan er virkin og verður uppdaterað javnan.

Við árslok hava meira enn 400.000 vitjanir verið á síðuni, hesi fýra árini hon hevur verið virkin.

Fundir og mál

Bygdarráðið hevur havt 15 bygdarráðsfundir í 2008. Íalt 180 mál hava verið til viðgerðar. Nógv virksemi hevur verið í kommununi seinastu árini og tað sæst aftur í fundarvirkseminum hjá bygdarráðnum.

Til samanberingar kann sigast, at í 2004 vóru 140 mál viðgjørd í bygdarráðnum.

Fólkatalið í kommununi er støðugt vaksandi og er nú komið upp á 1137 fólk.
Til samanberingar kann nevnast, at vit í 2004 vóru 1084 fólk.

Inntøkur, rakstur & íløgur í mió. 2000 - 2007



Grannskoðaði roknskapurin fyri 2007 varð góðkendur á fundi hin 02.juni 2008. Nettoskattainntøkurnar í 2007 vóru samanlagt kr. 28.842.888

Rakstrarútreiðslurnar vóru kr. 21.265.742 og gjørdar vóru íløgur fyri samanlagt kr. 23.310.632 tvs. at samlaðu nettoútreiðslurnar vóru kr. 44.576.374

Árið 2008 er serliga merkt av íløgum í byggibúning av sethúsaøkjum, byggibúning av vinnuøkinum við flogvøllin, vetrarfriðing, vatnleiðingini umframt vegagerð.

Fíggjarætlan 2009

Fíggjarætlanin fyri árið 2009 varð endaliga samtykt á bygdarráðsfundi hin 01. desembur 2008.

Samsvarandi ætlanini eru inntøkurnar frá persóns- og partafelagsskatti mettar til samanlagt slakar kr. 28 mió.

Skattaprosentið verður óbroytt 20,50% og barnafrádrátturin verður somuleiðis óbroyttur kr. 4.000 kr.
Persónsskatturin higartil í ár verður væntandi uml. 1,3 mió meira enn væntað.

Brutto & nettoskuld í mió. 2000 – 2007



Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2009 er ætlanin at gera íløgur fyri uml. 8,4 mió. kr. og eru m.a. hesar íløgur:

Íbúðarmál:	kr. 1.150.000
Felagsútr.:	kr. 2.430.000
Samferðsla og samskifti:	kr. 1.200.000
Skúlin/mentanarøkið	kr. 3.300.000

Bygdarráðsvalið 2008

Á bygdarráðsvalinum sum var 11. novembur 2008 stillaðu 22 fólk upp. Tey 7 ið skulu manna bygdarráðið komandi valskeið eru:

Sune Jacobsen	105	atkvøður
Jákup Suni Lauritsen	91	--
Erik Davidsen	65	--
Herálvur Jacobsen	57	--
Jóhan Frói á Ørg	56	--
Thordis Skaalum	53	--
Nancy Petsy Selfoss	38	--

Nývalda bygdarráðið samtykti einmælt á fundi 3. desembur 2008 at velja Suna Jacobsen til borgarstjóra , og Jóhan F. á Ørg til varaborgarstjóra.

Samstundis skipaði nýggja bygdarráðið seg soleiðis:

Fíggjarnevndin:
Sune Jacobsen, borgarstjóri, form, Herálvur Jacobsen, Jóhan á Ørg,

Tekniska nevnd:
Jákup Suni Lauritsen, form. Erik Davidsen, Nancy Selfoss,

Havnarnevndin:
Thordis Skaalum, form, Nancy Selfoss, Jóhan á Ørg,

Trivnaðarnevndin:
Nancy Selfoss, form, Thordis Skaalum, Jóhan á Ørg,

Vinnunevndin:
Herálvur Jacobsen, form, Erik Davidsen, Jákup Suni Lauritsen,

Brunanevndin:
Erik Davidsen, form, Jákup Suni Lauritsen.

At enda

Fíggjarligu útlitini í heiminum í dag eru meira ella minni ivasom og eisini her hjá okkum dregur á luftina – hóast glottar eru.

Fíggjarliga hevur okkara kommuna tað gott og vit hava góðar fíggjarligar umstøður. Útlitini til virksemi í kommununi í løtuni eru góð.

Tað er ikki lætt at spáa - og serliga ikki um framtíðina, verður onkuntíð skemtandi tikið til. Við tí virksemi vit vænta verður við flogvallarøkið komandi árini samanhildið við alt tað virksemið, sum er í kommununi annars, eiga vit ikki at síggja so svart uppá framtíðina.

Tá ein arbeiðir við kommunalum viðurskiftum er tað soleiðis, at ein ongantið verður liðugur. Tað eru altíð økir, sum kunnu gerast betur. Og soleiðis er tað eisini hjá okkum. Men flestu okkara eru samd um, at vit hetta seinasta skeiðið hava rokkið fleiri málum, sum vit ikki væntaðu kundu røkkast. Umstøðurnar til at røkka hesum málum hava eisini verið til okkara fyrimun.

Vit eiga í kommunu okkara nógv dugnaligt fólk, fólk við fakligum førleika, fólk sum hevur vilja og hegni til at røkka longur framá.

Undirritaði hevur seinastu fýra árini sitið við stýrisvølin í kommunu okkara. Henda tíðin hevur verið ein sera lærurík tíð - við nógvum avbjóðingum.

Uttan dugnalig starvsfólk hevði tað ikki borið til og vil eg fegin takka tykkum øllum fyri tíðina.

Eg havi fingið tann heiður at verða valdur í bygdarráðið komandi fýra ára skeiðið og vil eg saman við nývalda borgarstjóranum og hinum, ið vald eru, gera mítt ítarsta fyri kommunu okkara.

Okkara nærumhvørvi er partur av tí globala heiminum og vit hava ábyrgd – samábyrgd - av at verja um ta náttúru vit hava fingið av skaparans hond. Vit hava ábyrgd av at geva hana víðari til okkara eftirkomarar í minst líka góðum standi, sum vit fingu hana.



Hvat framtíðin hevur í skjáttuni til okkum sum fólk og serliga til okkara her vesturi á landi, kunnu vit bara meta um. Latið okkum gera orðini hjá Áarstovubrøðrunum, "saman at standa var ei okkum givið, tí er so lítið burtur úr her blivið", eins og "níðingaslatrið" í yrkingini hjá bróðurinum til skammar. Latið okkum líta við treysti at komandi døgum, vitandi, at her býr fólk, ið saman vil stríða seg framá til gagns fyri høg og lág, stór og smá, hjálpin og óhjálpin.

Einglar tað bóru
jólanátt for hirðum
mann eftir mann hoyrdist sama lag
friður á foldum
menniskja frø teg
tær føddur frelsari er í dag

Við hesum fari eg vegna bygdarráðið at ynskja tykkum øllum eitt av Harranum signað nýggjár, við tøkk fyri tað brátt farna.

Sørvágur, 28. desembur 2008

Vinarliga

Sørvágs Kommuna

Jákup Suni Lauritsen
Borgarstjóri

Sørvágs kommuna

Yvirlit

Høvuðsyvirlit

Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan **2009**

Túsund kr.		Rakstrarætlan Útreiðslur	Rakstrarætlan Inntøkur	Løgu-ætlan
§ 1.	**Kommunal fyrisiting**	**4.355**	-	-
	11. Felagsútreiðslur	4.355	-	-
§ 2.	**Almanna- og heilsumál**	**1.871**	-	-
	20. Heilsumál	859	-	-
	21. Almannamál	1.012	-	-
§ 3.	**Børn og ung**	**5.791**	-	**50**
	26. Barnaansing	5.791	-	50
§ 4.	**Undirvísing**	**1.725**	-	**1.300**
	23. Útbúgving og gransking	1.725	-	1.300
§ 5.	**Mentan og fritíð**	**1.817**	-	**2.000**
	23. Útbúgving og gransking	366	-	2.000
	24. Mentan	1.451	-	-
§ 6.	**Teknisk mál**	**2.499**	-	**4.575**
	11. Felagsútreiðslur	81	-	2.430
	22. Íbúðarmál	-	-	1.150
	24. Mentan	84	-	-
	30. Umhvørvi	493	-	200
	37. Handil og vinna annars	-	-	-455
	38. Samferðsla og samskifti	1.842	-	1.250
§ 7.	**Kommunal virki**	**1.863**	-	**500**
	30. Umhvørvi	1.670	-	-
	31. Tilbúgving	405	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	-211	-	500
Tilsamans		**19.922**	-	**8.425**
§ 20.	22. Íbúðarmál	1.000	-	-
§ 20.	35. Sjóvinna	-	-	-
§ 20.	50. Rentur	450	396	-
§ 20.	52. Skattir og avgjøld	-	29.053	-
Tilsamans		21.372	29.449	8.425
Yvirskot		-	8.078	-
Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ		-	**-347**	-
§ 25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-	-3.363	-
Nettokassaúrslit		-	**-3.710**	**-3.710**
§ 25.	62. Afturgjald av skuld	3.610	-	-
Bruttokassaúrslit		**3.610**	**-3.710**	**-7.320**
Figging:				
§ 25.	64. Útvegan av gjaldføri	-	7.320	-
Figging ialt:		-	7.320	7.320
Samanlagt		**3.610**	**3.610**	-

Bygdaráðsfundir í 2009

Sørvágs Kommuna hevur ásett føstu almennu fundirnar fyri 2009. Fundirnir verða kl. 18:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni hesar dagar:

Mikukvøldið	28. januar
Hóskvøldið	26. februar
Hóskvøldið	26. mars
Mikukvøldið	29. apríl
Mikukvøldið	27. mai
Mikukvøldið	24. juni
Mikukvøldið	02. september
Mikukvøldið	30. september
Mikukvøldið	28. oktober
Mikukvøldið	11. november
Mikukvøldið	25. november
Mikukvøldið	09. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Eykafundir ella broytingar til omanfyri nevndu, verða lýstir á svørtutalvu við kommunuskrivstovuna.

------ o ------

Um tú ætlar at brenna bál nýggjársaftan, er neyðugt at søkja um loyvi frá Sørvágs kommunu. Tlf 23 32 00 innan 31. desembur klokkan 12.00.

Treytirnar fyri at fáa loyvi eru hesar:

- at bert reinur og turrur viður verður nýttur.
- at veðrið er til vildar.
- at økið verður ruddað skjótast gjørligt dagin eftir.
- at navnsnevndur ábyrgdarpersónur verður uppskrivaður hjá kommununi.

Hesar treytir skulu tryggja, at bálbrenningin verður gjørd við skynsemi, umframt at minst møgulig umhvørvisárin standast av brenningini.

Sørvágs Kommuna

Varðagøta 8

FO-380 Sørvágur